umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN

Argir hin 12. september 2023
Málsnr.: 22/00010-45
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av royndarverkætlan við einum D12 sjóvarfalsorkuverki í Vestmannasundi**

Umhvørvisstovan góðkennir sambært § 21, stk. 1 í havumhvørvislógini[1] og § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[2] eina royndarverkætlan at seta eitt D12 sjóvarfalsorkuverk út í Vestmannasund. Royndarverkætlanin er ætlað at vara tvey ár.

## 1. Heimild

Sambært § 21, stk. 1 í havumhvørvislógini skulu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum hava týðandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, ikki setast í verk uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Góðkenningar sambært § 21, stk. 1 kunnu sambært stk. 2 ikki veitast fyrr enn mett er um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi. Sambært stk. 3 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um innihaldið í metingunum sambært stk. 2, og sambært stk. 4 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, hvørjar verkætlanir og virksemi skulu góðkennast sambært stk. 1. Umhvørvisstovan umsitur hesar heimildir.

Umhvørvisstovan metir, at drekar, sum sveima uppi í sjónum, kunnu hava stóra ávirkan á náttúru og umhvørvi, serliga hval og kóp, og tí skulu hava góðkenning sambært § 21, stk. 1 í havumhvørvislógini og hartil hoyrandi umhvørvisárinsmeting.

Sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini skal árinsmeting gerast og góðkennast av landsstýrismanninum, áðrenn loyvi verður givið til elframleiðslu. Umhvørvisstovan umsitur hesa heimild.

## 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 5. januar 2023 árinsmeting fyri eina royndarverkætlan at seta eitt D12 sjóvarfalsorkuverk út í Vestmannasund.

## 3. Lýsing av verkætlanini

SEV hevur síðan 2020 gjørt royndir við at framleiða el við sjóvarfalsturbinum í Vestmannasundi. Talan er um sjóvarfalsturbinur ella drekar, ið líkjast flogførum, sum sveima uppi í sjónum. Hesir drekarnir hava ein framleiðslumátt upp á 100 kW. Drekin, sum ætlanin nú er at seta út, nevndur Dragon Class D12, er væl størri, og hevur ein framleiðslumátt upp á 1,2 MW.

D12 drekin er 9,8 m langur, hevur eitt veingjabreiði upp á 12 metrar og vigar 28 tons. Drekin verður festur við tjóðri í eitt fundament á botni og sveimar í eini áttatalsrás, sum er uml. 30 x 55 metrar á einum dýpi millum 35 og 65 metrar, meðan rákið er, men hongur stillur á 8 metra dýpi í kyrrindum. Drekin ferðast umleið 6 - 10 m/s gjøgnum sjógvin. Umframt at tjóðra drekan til fundamentið, hevur festið eisini kaðlar til elveiting og samskifti. Úr fundamentinum verður sjókaðal til Vestmannar. Drekin verður settur út á uml. 72 metra dýpi.

Kaðalin kemur upp á land Inni á Fjørð í Vestmanna. Ætlanin er ikki at grava kaðalin niður, men roknað verður við, at hann søkkur nakað niður í havbotnin av eginvektini, har bleytur botnur er.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum
[2] Løgtingslóg nr. 59 frá 2012 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni




Dreki til elframleiðslu

## 4. Umhvørvisárinsmeting

SEV hevur gjørt eina umhvørvisárinsmeting fyri verkætlanina. Árinsmetingin viðger hvørja ávirkan verkætlanin kann hava á náttúru og umhvørvi. Í árinsmetingini verða árini á fisk, sjófugl, hval og kóp lýst eins og møgulig átøk, ið kunnu tálma árin á hval og kóp.

Eftir áheitan frá SEV hevur Havstovan gjørt eina meting um, hvørji árin ætlaða royndarverkætlanin kann fáa á djór á royndarstaðnum “Árinsmeting av royndarverkætlan KIOP001 á djór á sjónum”.

Fiskur, sum er vanligur í Vestamannasundi, er seiður, nebbasild, toskur (smáfiskur), hýsa og møguliga onnur sløg, so sum reyðsprøka og sandsprøka. Eisini eru fleiri sløg av hávi, so sum brugda og hákelling um oyggjarnar. Hákelling er sjáldsom men brugda er vanligari.

Í Vestmannasundi eru eisini fleiri fuglasløg. Um summarið eru tey vanligu sløgini lundi, lomvigi, álka, terna, skarvur, æða, teisti, havhestur, rita, likka, svartbakur og fiskimási. Um veturin eru tey vanligu sløgini lundi, lomvigi, álka, skarvur, æða, teisti, havhestur, rita, svartbakur, fiskimási.

Í juli og august 2020 og 2021 vórðu eygleiðingar gjørdar av hvali og kópi í Vestmannasundi. Eygleiðingarnar vístu, at nísa og láturkópur eru sera vanlig. Onnur hvalasløg eru eygleidd av og á. Hesi eru sildreki, nebbafiskur, kúlubøka, bóghvítuhvalur, skjórutur springari og grindahvalur. Hetta samsvarar við eygleiðingar, sum í 1980- og 1990-árunum vórðu gjørdar umborð á ferjuni Sam, sum sigldi millum Oyrargjógv og Vestmanna. Seinastu 20 árini hevur í miðal verið ein grind um árið í Leynum ella Vestmanna.

Í juli 2020 vórðu tveir láturkópar í Vestmannasundi merktir við sendara, sum m.a. vístu ferðingina hjá teimum í uml. fimm mánaðir. Kanningin vísti, at kóparnir ferðaðust mest í Vestmannasundi, men eisini runt Vágar og Mykines og so langt sum til suðurendan av Suðuroy. Roynt varð at seta sendarar á kóp í 2021 og 2022, men tað eydnaðist ikki. Ætlanin er at merkja tveir kópar í 2023.

Niðurstøðan av árinsmetingini er, at tað ikki verður mett, at royndarverkætlanin fer at hava stórvegis ávirkan á fisk og sjófugl, men at havsúgdjór helst eru teir viðbreknastu bólkarnir. Árinið á hval og kóp kann verða beinleiðis samanstoytur við drekan, sum kann elva til, at hvalur og kópur fær stóran skaða ella doyr.

Mett verður ikki, at óljóðið er nóg hart til, at hvalur og kópur fær skaða, men óljóð kann styggja hval og kóp burtur av økinum, og harvið gera liviumstøðurnar verri, við tað at økið, sum teir kunnu halda til á, verður minni. Kanningar aðrastaðni vísa, at kópur heldur seg burtur frá slíkum orkuverkum, tá tey er virkin. Kópalátur eru nærhendis royndarøkinum, og benda kanningar hjá Havstovuni á, at talan kann vera um ein lokalan kópastovn. Umráðandi er at fáa greiði á, hvussu sjóvarfalsorkuverk av hesum slagnum kunnu ávirka kópastovnin.

Mett verður, at bæði kópur og hvalur sansa orkuverkið í minsta lagi tveir km burturfrá, og at teir tí verða ávaraðir í góðari tíð og kunnu svimja uttanum. Tí verður hildið, at lítil sannlíkindi eru fyri samanstoyti. Verður ein grind rikin móti orkuverkinum, verða sannlíkindini fyri samanstoyti munandi størri.

Í árinsmetingini verða eisini lýst átøk, sum kunnu setast í verk fyri at verja kóp og hval. Til dømis at tað er møguligt er at steðga orkuverkinum við stuttum skotbrái. Hetta verður helst neyðugt, um grind veður rikin í Vestmannasundi. Upptøkur við hydrofonum eru gjørdar í ár, fyri at kanna, um til ber at hoyra, um hvalur ferðast í økinum. Enn eru eingi úrslit tøk.

Kanningarnar av hvali og kópi, sum higartil eru gjørdar, vísa støðuna áðrenn drekarnir komu í rakstur, og eru ein týðandi partur av grundarlagnum fyri at meta um, hvørja ávirkan slíkir drekar kunnu hava á kóp og hval.

Tað er umráðandi, at kanningar framhaldandi verða gjørdar av, hvussu hvalur og kópur verða ávirkaðir av drekunum, áðrenn støða verður tikin til at seta fleiri drekar út. Treyt verður tí sett um, at hildið verður fram at kanna og eygleiða hval og kóp í Vestmannasundi.

## 5. Málsviðgerð

Umhvørvisárinsmeting varð løgd til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni hin 20. februar 2023. Freistin at gera viðmerkingar var 3. apríl 2023. Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar til hoyringina.

Uppskot til góðkenning varð hin 15. mai 2023 sent SEV, Elveitingareftirlitinum á Umhvørvisstovuni og Vestmanna kommunu til viðmerkingar.

5.1 SEV hevði fleiri ítøkiligar viðmerkingar.
30. juni 2023 var fundur millum Umhvørvisstovuna, Havstovuna, SEV og Minesto um viðmerkingarnar. Umhvørvisstovan hevur tikið stóran part av viðmerkingunum til eftirtektar.

5.2 Elveitingareftirlitið hevði onga viðmerking.

5.3 Vestmanna kommuna viðmerkti, at royndarverkætlanin fer at ávirka sigling inn á Vestmanna, um tað ikki verður loyvt at sigla gjøgnum royndarøkið, og at dýpið niður á drekan, tá hann hongur stillur, skal vera í minsta lagi 12 metrar.
Til hetta hevur SEV viðmerkt, at tað ikki er ætlanin at banna sigling á royndarøkinum.
Eisini viðmerkti Vestmanna kommuna, at við hesi verkætlan missa borgarar í Vestmanna kommunu enn eitt fiskimið.
SEV viðmerkti til hetta, at staðiliga verður mælt frá at kasta akker, fiska (við línu av einhvørjum slag) og at arbeiða á botni (kava), og ynskir at frámerkja eitt økið, sum er 75m í radius runt um drekan.

Umhvørvisstovan heldur ikki, at viðmerkingarnar frá Vestmanna kommunu eru viðkomandi fyri ávirkan á náttúru og umhvørvi, og at hesi viðurskifti ikki eru fevnd av § 21 í havumhvørvislógini ella § 16 í elveitingarlógini, sum deildin Vernd á Umhvørvis-stovuni umsitur.

## 6. Avgerð

Sambært § 21, stk. 1 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum góðkennir Umhvørvisstovan, at SEV í eini royndarverkætlan í tvey ár setir ein D12 sjóvarfalsorkudreka út í Vestmannasund.

Avgerðin er grundað á umhvørvisárinsmeting hjá SEV fyri verkætlanina. Avgerðin ber eisini í sær, at verkætlanin lýkur treytina í § 16, stk. 1 í elveitingarlógini fyri at fáa loyvi at framleiða el.

Avgerðin verður givin við hesum treytum:

6.1 At royndarverkætlanin er avmarkað til tvey ár frá tí, at drekin verður settur út fyrstu ferð, og verður framd sum greitt verður frá í árinsmetingini og øðrum samskifti millum Umhvørvisstovuna og SEV.
6.2 SEV boðar Umhvørvisstovuni frá, tá verkætlanin byrjar, og drekin verður settur út.
6.3 Um royndartíðarskeiðið skal leingjast, skal tað góðkennast av Umhvørvisstovuni. Umsókn skal sendast Umhvørvisstovuni í góðari tíð frammanundan.
6.4 Verkætlanin skal fremjast soleiðis, at hon hevur minst møgulig árin á náttúru og umhvørvi.
6.5 SEV skal, fyrsta ári meðan verkætlanin varar, skipa fyri eygleiðingum fugli í Vestmannasundi. SEV sendir Umhvørvisstovuni ætlanir fyri eygleiðingarnar.
6.6 SEV skal á hvørjum ári meðan verkætlanin varar, skipa fyri eygleiðingum av hvali og kópi í Vestmannasundi. SEV sendir Umhvørvisstovuni ætlanir fyri eygleiðingarnar.
6.7 SEV skal hava eftirlit við, um samanstoytir eru millum orkuverkið og kóp ella hval, og skal skráseta, um skaddur ella deyður kópur ella hvalur verður funnin í sundinum ella økjunum nærhendis.
6.8 At SEV ger eina verkætlan um, hvussu kópur frá látrunum nærhendis ferðast í økinum, og um hann verður ávirkaður av drekanum.
6.9 SEV sendir Umuvørvisstovuni eina frágreiðing um gongdina, eitt nú niðurstøður frá gjørdum kanningum, eygleiðingum o.ø. í seinasta lagi eitt ár eftir og tvey ár eftir, at drekin er settur út.
6.10 Tá royndarverkætlanin er liðug, skal øll útgerð takast upp og beinast burtur við minst møguligum árini á náttúru og umhvørvi.

## 7. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar.

## 8. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd, og skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2023.

Møgulig kæra skal sendast við telduposti til us@us.fo ella til Umhvørvisstovuna, Traðagøta 38, 165 Argir.

Sigga Jacobsen, deildarleiðari / Suni Petersen, málsviðgeri